# Fólk søkist

**Handil og Kaffi á Vaglinum, Tórshavn, søkir hjálparfólk sum skjótast**

Umframt sølu av framleiddum lutum frá ALV verkstaðnum og frá fólkum runt um landi, selja vit eisini ymisk sløg av vælbryggjaðum kaffi.

**Vit ynskja at**
- Tú er skjót/-ur, rólig/-ur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt, samstundis sum tú er fyrikomandi og hevur sans fyri at samskifta við kundan.
- Tú hevur áhuga og royndir innan handil og servering og er sinnaður at læra nýtt.
- Tú dugir at tosa danskt og enskt.
- Tú hevur kunnleika til handgjørdar vørur.

**Arbeiðsviðurskiftir**
Fyribilsstarv frá juni til septembur og arbeiðstíðin er 25-30 t/v.
Handilin er opin allar dagar í vikuni frá kl.9 til 21. Sunnudag frá 14 til 21.
Starvið er vælegnað til tín, ið hugsar um eitt lættari starv.
Starvið verður at byrja skjótast.

Meira fæst at vita við at venda sær til Charlottu á Váli Olsen, leiðara á tlf. 214899

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 7. juni 2007.

**Sjálvsognarstovnurin Alv**
Boks 301 · 110 Tórshavn

# Skúlin á Fossánesi

**Søkt verður eftir stuðulsfólki**
- Eitt starv 25 tímar um vikuna, til serligan tørv. Skúlaárið 2007/2008

**Tann ið settur verður skal:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Duga at samstarva og vera fyrikomandi
- Vera fús/ur at taka á seg tær uppgávur, ið eru á skúlanum
- Vera stundislig/ur og nærløgd/lagdur

Fyrimun hava umsøkjarar við royndum í mennandi stuðulsarbeiði og viðkomandi útbúgvingum.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pedagogfelagið

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. juni 2007

Fleiri upplýsningar um starvið fært tú við at venda tær til Poul Jacob Zachariassen, skúlaleiðara á tlf. 452120 ella 585894

**SKÚLIN Á FOSSÁNESI**
730 Norðdepil · tlf. 452120 · fax 452122
T-postur: fos@skulin.fo · www.skulin.fo/fos

Skúlin á Fossánesi hevur komandi skúlaár 41 næmingar, sum ganga í 1.til 7. flokk. Skúlin er væl útgjørdur við bókum og amboðum.Sí annars heimasíðuna.

**FUGLAFJARÐAR KOMMUNA**

# PEDAGOGAR OG HJÁLPARFÓLK
## TIL FUGLAFJARÐAR

Søkt verður eftir pedagogum og hjálparfólkum til vøggustovuna og barnagarðin hjá Fuglafjarðar kommunu.

Eitt pedagogstarv á 40 t. viku í barnagarðsstovu.

Eitt pedagogstarv á 20 t. viku í barnagarðsstovu.

Eitt tíðaravmarka pedagogstarv 35 t. viku, at arbeiða við sertørvi í stovnum hjá Fuglafjarðar kommunu, í tíðarskeiðnum 01.08.2007 til og við 31.05.2008

**Tíðaravmarka størv í vøggustovu.**
Eitt hjálparfólka starv á 20 t. viku og eitt á 25 t. viku í tíðarskeiðnum 01.08.2007 til og við 30.06.2008.

Umsøkjararnir verða bidnir um at viðmerkja, hvørji størv tey søkja.

Dagstovnurin er skipaður í tvey hús, við eini barnagarðstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Frá 01.08.2006 er Dagstovnurin ætlaður 76 børnum, við tað at stovnurin er víðkaður við eini barnagarðsstovu.

**Vit sóknast eftir pedagogum og hjálparfólkum:**
- ið kunna arbeiða sjálvstøðugt, og eru førir fyri at orða seg skrivliga
- hevur fakliga vitan, sum kann nýtast í dagliga arbeiðinum
- hevur umsorgan fyri børnunum
- er eldhugaður og jaligur
- hevur góð samstarvsevnir
- sær møguleikar fram um mørk

**Vit kunnu bjóða tær:**
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur
- eitt starv, har tú kanst brúka tínar dygdir, hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan
- samstarv við NSR tænastu, náms- og sálarfrøðilig ráðgeving,
- sosialu deild og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu

**Setanartreytir**
Løn eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran í dagstovninum

Juliannu Næs á tlf 225222.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum, skulu verða Býráðskrivstovuni, Norður í Gerði 10b, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi 18. juni kl. 10.00

Møguligar setanarsamrøður verða í viku 25.

Kommunan skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknir ella onga at taka.

**Fuglafjarðar kommuna**

# Avloysari til taxabil

Álítandi avloysari søkist til taxabil í ferium og vikuskiftum, umframt aðrar tíðir, at byrja skjótast gjørligt.

**Bill. mrk. 3105**

TVØROYRAR KOMMUNA

## BARNAGARÐURIN MÝRIFIPAN

# Leiðari til Barnagarðin Mýrifipan

Barnagarðurin Mýrifipan søkir eftir leiðara 40 t./v. at byrja 1. august. Okkara dugnaligi leiðari hevur sagt seg úr starvi vegna víðari útbúgving, tí sóknast vit eftir einum nýggjum leiðara.

Í barnagarðinum eru 67 børn býtt í 2 stovur og 1 vøggustovu. Harumframt eru 20 børn í útibarnagarði. Í barnagarðinum er eisini eitt stuðulstoymi, sum tekur sær av børnum við serligum tørvi.

Á dagstovnaøkinum í Tvøroyrar kommunu eru broytingar á veg, við tað at ein vil byggja eina integreraða institutión, har bæði dagrøktin (spælistovan) og barnagarðurin eru saman, kortini við hvør sínum leiðara. Somuleiðis er ætlanin at fáa avtalustýring í kommununi við barnagarðinum sum eitt pilotprojekt. Tann, ið verður settur, má tí vera nýhugsandi og megna at møta fjølbroyttum avbjóðingum.

**Vit bjóða**
- Eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi har náttúran hevur stóran týdning og leiklut í gerandisdegnum og har spælið fyllir nógv.
- Dugnalig starvsfólk.
- Eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði við nógvum avbjóðingum.
- Møguleika fyri sjálvstøðugari støðutakan innanfyri avtalaðar karmar.
- Møguleika fyri eftirútbúgving innan leiðslu o.a.

**Vit vænta at tú**
- Ert útbúvin námsfrøðingur, helst við leiðsluroyndum.
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir.
- Hevur hugsjónir um virksemi á einum stovni, ið rúmar bæði vøggustovu, barnagarð og útibarnagarð.
- Hevur hug og áræði at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag í einum avbjóðandi fakumhvørvi, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum umframt foreldrum og starvsfelgum.
- Hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi.
- Sært møguleikar framum vansar.
- Hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir.
- Kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur.
- Dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanveggja.
- Hevur teldukunnleika á brúkarastøði.

**Setanaviðurskifti**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF.

**Meiri fæst at vita**
Um starvið við at venda sær til Susanne Madsen, leiðara á sosialu deild, á tlf. 371085 kl. 10.00 – 16.00

**Umsókn**
Saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving, skal sendast til:

**Tvøroyrar Kommuna, sosiala deild**
Tvørávegur 27 · FO- 800 Tvøroyri
viðm. »Leiðari til Barnagarðin«

Freistin at søkja er fríggjadagin 15. juni.